Tveir málningar:

# Kambsdal og Chagall



*Hesin málningur hjá Heðini Kambsdal lýsir jólakvøld. Har er ljós um fløturnar, fjallagreinirnar kring Fuglafjørð og har er eisini gylt ljós inni í fjósinum.*

HUGLEIÐING
*Frits Johannessen*

## Ein mynd hjá Heðini Kambsdal

Mong orð eru søgd um barnið í krubbuni, um einglarnar á markini og hirðarnar og vísmenninar úr eysturlondum. Barnið er miðdepilin í hesi frásøgn. Steintór svávur og Marjun eiga ein so frægan málning av Heðini av fjósinum, sum Petur Jacob pápabeiggi hevði uppi við Torvgilskrók. Málningurin lýsir jólakvøld. Har er ljós um fløturnar, fjallagreinirnar kring Fuglafjørð og har er eisini gylt ljós inni í fjósinum. Maður, Petur Jacob, stendur í reyðum kyrtli við útrættari hond og peikar inn í fjósið, inn til tað glógvandi ljósið og býður fólki inn um. Faðir kemur hóvliga leiðandi við eini Fjalsær móti fjósinum. Hann ætlar sær eisini inn í fjósið jólanátt – inn í tað lyndrandi ljósið, sum er innandura. Tá ið tú hyggur at málninginum, er eisini boðskapurin til tín: Ger so væl og kom inn. Petur Jacob og faðir vóru mammubeiggjar Heðins.

Ofta gera listafólk tað, at tey mála tað, sum ikki er, men hóast tað, so er tað kortini. Tað ger Heðin eisini í hesi føgru mynd, tað er tað ljósið, sum kemur frá betlehemstjørnuni, sum stavar niður yvir fjósið og endurspeglar sær á firðinum, hamrunum, fjallagreinunum húsatekjunum og bønum, og fevnir um alt, men tú sært ikki stjørnuna. Hetta fyllir so nógv, at málningurin rópar til tín: Tak við hesum stjørnuljósi, sum tú ikki sært, men, sum er til staðar hóast alt.

Vit verða drigin at ljósinum. Sjálvt dýrini, seyðurin letur seg draga at ljósinum. Vit høvdu seyð alla mína tíð Norðuri á Bakka. Faðir átti eitt frælsi í Innandals og høvdu vit eina ær gangandi her. Henda ær leitaði altíð upp hús, tá ið hon bleiv svang út á veturin. Tá ið faðir doyði 1986, tók eg um endan. Nú var øskukalt á Bakkanum, og kom ærin ikki norður. Eitt leygarkvøld í febr. fór eg vestur á Skorðar og ætlaði at taka ærina. Hon lá altíð við hetta seyðahúsið. Hugsaði tað, at tá ið hon var komin innum, so skuldi eg taka ærina, men hon lá uttan fyri seyðahúsið hetta kvøldið, so eg vildi ikki pøsa meg og ærina, men hugsaði at fara vestur aftur í árla dagin eftir. Sum hugsað, so gjørt. Tá ið eg kom vestur aftur sunnumorgun, var eingin ær, so eg fór so nipin norðuraftur.

Tá ið eg gjørdi meg til reiðar at fara í kirkju, og stóð og knýtti slipsknútin framman fyri vindeygað, stóð ærin og gløðdi upp í køksvindeygað í tí fáliga køksljósinum, sum rakk út í tún Norðuri í Gerði. Ja, tá máttti eg smírast og ikki bara tað, men undrast. Ærin er óivað komin aftan á mær kvøldið fyri, uttan at eg hevði varnast tað. Hetta var løgið, men hon leitaði eftir tí horvnu glæmuni á Bakkanum og stóð nú í glæmuni frá køksvindeyganum hjá mær og Alexandru. Hon leitaði til ljósið og stóð har so vónrík í hesi glæmu. Hóast faðir var farin, og ikki var til staðar, so var hann kortini í tí siðvenju, sum ærin hevði lært av honum, og hetta frøddi hjartað, at ljósið Norðuri í Gerði var eins gott sum tað á Bakkanum. Jú, tað, sum ikki var, tað var.

Ljósið í krubbuni – Jesusbarnið dróg til sín vísmenn, hirðar og annað gott fólk at einum skirvisligum, karlagnum fjósi í



*Chagall bleiv og er ein av okkara mætastu listamonnum í heiminum. Hann hevur málað hendan málningin, sum hann kallar fyri Solitude, einsemi.*